BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

10. oktober 2025
Mál: 22/22133-143
Viðgjørt: JáR

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-024/2025 eftir § 52a í Tingskipanini frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Útbúgvin á Heilsuskúlanum

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv heilsustarvsfólk eru útbúgvin á Heilsuskúlanum síðani 2006?
2. Hvussu stórt hevur fráfalsprosentið verið síðani 2006?
3. Hvussu nógv eru upptikin á Heilsuskúlanum síðani 2006 í mun til tøk upptøkupláss hesi árini?

Svar

Til 1: Heilsurøktaraútbúgvingin byrjaði í 2006, so tey fyrstu prógvtølini eru frá 2008. Tøl frá Heilsuskúlanum vísa, at í alt hava 299 heilsurøktarar fingið prógv í tíðarskeiðinum 2008 til 2025.

Fyri Heilsuhjálparaútbúgvingina eru tøl aftur til 2006. Í alt hava 525 heilsuhjáparar fingið prógv árini 2006-2025.

Verður hugt nærri eftir tølunum, hava í miðal 30 heilsuhjálparar fingið prógv um árið árini 2006-2020. Síðan 2021 er talið tó fallið, og í miðal hava um 15 heilsuhjálparanæmingar fingið prógv um árið síðan 2021.

Tøl fyri heilsurøktaranæmingar árini 2008-2025 vísa, at í miðal hava umleið 17 heilsurøktarar fingið prógv um árið.

Til. 2: Fyri báðar útbúgvingar er galdandi, at fráfalsprosentið sveiggjar nakað.

Í miðal hevur fráfallið verið um 20% fyri tíðarskeiðið 2008-2025 fyri heilsurøktaranæmingarnar. Í miðal hevur fráfallið verið um 18 % fyri heilsuhjálparanæmingarnar árini 2006-2025. Fyri báðar útbúgvingarnar er galdandi, at nøkur ár er fráfallið væl minni, og nøkur ár væl meira, sum ávirkar samlaða miðaltalið.

Til 3: Heilsuhjálparaflokkarnir hava havt 48 tøk pláss um árið fyri tíðarskeiðið 2006 til 2025. Fram til 2019 vóru umleið 75-100% av tøku plássunum brúkt. Frá 2020 lækkaði talið tó niður á 30-55% av tøku plássunum, sum vóru brúkt.

Fyri heilsurøktarar hevur ein flokkur verið boðin út frá 2006 til 2014 við 25 plássum hvørt árið. Í 2014 lækkaði floksstøddin niður í 21 vegna avmarkað tal av starvsvenjingarplássum. Síðan 2024 hava tvær upptøkur verið um árið og 17 starvsvenjingarpláss fyri hvørja upptøku, í alt 34 pláss um árið. Árini 2006-2022 var talan um rættiliga fullsettar flokkar. Men síðan 2023 hava umleið helvtina av tøku plássinum verið brúkt – serliga aftaná, at tvær upptøkur hava verið um árið og 34 tøk pláss.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður